Skjal 7

**LANDSSKJALASAVNIÐ**
(Faroese National Archives)
V. U. Hammershaimbsgøta 24
FO-100 Tórshavn, Føroyar - Faroe Islands
Tlf. + 298 31 66 77 - Fax + 298 31 86 77
e-mail: fararch@lss.fo

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39, box 2039
160 Argir

Dagfest 14. februar 2011
Mál: 201100008-2
Viðgjørt: SJ

**Hoyringssvar viðv. uppskoti til løgtingslóg um manntal 2011**

Vísandi til skriv frá Fíggjarmálaráðnum hin 31. januar 2011, hevur Landsskjalasavnið, m.a. eftir samráð við Ílegusavnið, hesar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Til § 6, stk. 3
Landsskjalasavnið er saman við Ílegusavninum í holt við at gera ættarskrá yvir fólkið í Føroyum. Fyri at fáa hetta arbeiðið so fullfíggjað sum gjørligt hevði verið sera ynskiligt at kunna fingið atgongd til ættarbandsupplýsingar í manntali og soleiðis kunna brúkt tað til at eftirkanna skrásetingar í Ættarbandsskránni.

Til § 7, stk. 2
Óneyðugt við slíkum ásetingum av ávísum áramáli viðvíkjandi atgeingi, tá hesar ásetingar longu finnast í lógini um Landsskjalasavnið. - Slík áseting fer at hava við sær, at skipanin verður meira stirvin enn neyðugt. Í fyrsta lagi áleggur ein tílík áseting eyka og óneyðuga umsiting á Landsskjalasavnið. Í øðrum lagi tekur hon ikki atlit til møguligar framtíðar broytingar í reglum fyri atgeingi til upplýsingar. – Landsskjalasavnið heldur tí, at einans er neyðugt at vísa til galdandi lóg á økinum.

Vinarliga

Sámal T.F. Johansen
skjalasavnsvørður